**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1708.**
**Tíðarskeið: 24/03-29/03 – 2017**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Petersen, Poul Vestergard, Regin Kristiansen og Helga Bára Mohr Vang (túrleiðari).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndum sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa og longu.

**Aðrar uppgávur:** Nakað av toski, hýsu og øðrum varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 m og 120. Seabird CTD við rosettu. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini fríggjarmorgun kl 06, nakað seinkað av veðri. Av tí at nógvar støðir manglaðu á túri 1706, byrjaðu vit við at fara eystureftir á Fugloyartunguna og fingu har tríggjar støðir. Síðan varð kósin sett móti Føroyabanka og vit vóru frammi seint leygarkvøldið. Vit byrjaðu at taka støðir sunnudagin. Tíðin fór ikki at røkka til at taka allar 29 støðirnar, og tí avgjørdu vit at raðfesta tær støðir, sum vóru grynri enn 200 m. Í alt vórðu 19 trolstøðir tiknar, 6 CTD-støðir og 4 glúpstøðir. Miniloggararnir vórðu kalibreraðir í Bankarennuni. Tíverri var bert ein miniloggari, tí hinir báðir vórðu mistir á túri 1706. Vit vóru á Havnini mikumorgunin kl. 9 og landaðu mikudagin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri. Talið av nytrum var sum ætlað fyri hýsu, men ikki fyri tosk, tí nokk var ikki av toski.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 31. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. juni.

**Fyribilsúrslit:** Veiðan av toski var 118 toskar í mun til 30 toskar í fjør. Tó skal viðmerkjast at harav vóru 96 toskar fingnir í einum háli (puntur XVII.24, dýpi 118 m). Fyri hýsu var meira enn tríggjar ferðir so nógv at fáa og hetta komst ikki av einstøkum hálum, heldur var hýsan spjadd væl um allan tann grunna partin av Føroyabanka. Nógv var at fáa av smáari hýsu. Úrslitini fyri fisk á djúpum vatni (upsa, longu, brosmu, gulllaks o.a.) skulu takast við fyrivarni, tí ongar djúpar støðir vórðu tiknar í ár. Magakanningar vístu, at væl var til av nebbasild og at fiskurin át lítið krabbadýrum, eins og var vanligt fyri umleið 2005.

**Talva 1:** Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1708, yvirlitstroling á Føroyabanka í mars 2017.

| | KG í 19 hálum | Nytrur | Magar | KG í 29 hálum í fjør | Lutfall kg per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| Hýsa | 8798.303 | 351 | 50 | 2743.884 | 4.89 |
| Toskur | 1724.125 | 118 | 21 | 381.800 | 6.89 |
| Glýsufiskur | 486.324 | | | 378.835 | 1.96 |
| Loligo | 330.596 | | | 203.290 | 2.48 |
| Upsi | 302.930 | 84 | 12 | 343.000 | 1.35 |
| Longa | 116.520 | 2 | | 308.600 | 0.58 |
| Hvítingur | 67.178 | | | | |
| S.viviparus | 64.460 | | | 150.272 | 0.65 |
| Havtaska | 54.570 | | | 120.830 | 0.69 |
| Knurrhani | 52.225 | | | 137.420 | 0.58 |
| Glaskvoysa | 30.896 | | | 5.347 | 8.82 |
| Sandsprøka | 25.937 | | | 17.012 | 2.33 |
| Reyði Knurrhani | 9.512 | | | 18.272 | 0.79 |
| Tunga | 6.069 | | | 10.382 | 0.89 |
| Igulker | 3.383 | | | 10.525 | 0.49 |
| Brosma | 2.280 | | | 41.990 | 0.08 |
| Skaddur fiskur | 1.950 | | | | |
| Korkalitt igulker | 1.920 | | | | |
| Purpurigulker | 1.760 | | | 1.58 | 1.70 |
| Hvítingsbróðir | 1.391 | | | 2.558 | 0.83 |
| Kj. Kongafiskur | 1.255 | | | 189.957 | 0.01 |
| Gulllaksur | 1.225 | | | 1488.850 | 0.00 |
| Nebbasild | 1.187 | | | 8.396 | 0.22 |
| Naglaskøta | 1.005 | | | | |
| Gággukrabbi | 0.429 | | | | |
| Bivalvia (deyð) | 0.064 | | | 0.019 | 5.14 |
| Tilsamans | 11894.33 | 555 | 83 | | |

Havstovan, 4/4-2017



Petur Steingrund